## Motorsúkklukoyrarar úr Hetlandi

*11. apr 2006, 00:20*



Við Norrønu mánadagin vóru fýra motorsúkklukoyrarar, sum komu higar úr Hetlandi at vitja.

Ein teirra var Ron McMillan freelance journalistur úr Glascow í Skotlandi, ið skal skriva eina ferðafrásøgn til skotska MC-magasinið ”Motorcycle Sport & Leisure”.

Hini í ferðalagnum eru hjúnini Colin og Carol Fraser og Brian Anderson úr Hetlandi.

Mánakvøldið vitjaðu tey í felagshølunum hjá Føroya Ellisakførum, og týsdag gongur leiðin til Saksun og bygdirnar Norðureysturoy. Um kvøldið vitja tey nýstovnaða felagið MC Eysturoy. Mikudagin skulu tey vitja í Mjørkadali, á Sornfelli og í Vágum.

Tey fara avstað aftur við Norrønu fríggjadagin.

Tað er Ove Ritter frá Harley Davidson í Føroyum sum saman við sponsorum skipar fyri vitjanini.

© Magnus Gunnarsson [maggi@sosialurin.fo] - Sosialurin
Veitst tú eina søgu? Boða okkum frá á tlf. 341800